## Metingin

**Fuglfirðingar hava veruliga spílað seg út, soleiðis at hópurin á pappírinum er nógv styrktur. Megnar felagið at byggja víðari á góðu avrikini, sum til tíðir sóust í fjør, kunnu fuglfirðingar væl fara at arga tey stóru, hóast talan neyvan verður um stríð í heiðursmerkjarøðini**



Gull og heiður varð vunnið við Margáir, men Hanus Eliasen er nú aftur í Fuglafirði, har hann hevur sína fótbóltsuppaling

Mynd: Álvur Haraldsen

# Heima aftur í Fuglafirði

**Hanus Eliasen er komin heimaftur til ÍF, aftaná tvey ár í Sundalagnum. Boðin er kortini ikki líka hart spentur í Fuglafirði, sum við Margáir**

Hanus Eliasen er komin heim í dupultum týdningi. Hann er komin aftur til ÍF, aftaná tvey kappingarár í EB/Streymi, og hann hevur verið á drúgvari og spennandi fjakkaferð vestan hav.

Úrtøkan hjá Hanusi í EB/Streymi gjørdist góð. Hann hevur nú á tveimum sinnum roynt at verða steypavinnari, og í fjør vann hann FM-gull.

– Eg hevði eina sera spennandi tíð í EB/Streymi. Í Streymnesi var tað bara meistaraheitið, sum taldi, og tað setti krøv til spælarnar í hópinum. Vit høvdu ein sterkan hóp, og tað var ein spennandi tíð, greiðir Hanus frá.

Royndirnir Hanus hevði frá tí fyrru tíðini í ÍF, var at stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting, og var niðurflytingin í 2006 ein avgerandi orsøk til, at hann tá skifti felag.

Hanus fekk eisini roynt seg í UEFA Cup saman við EB/Streymi, og gjørdist talan um eina ógloymandi uppliving, tá teir spældu ímóti Manchester City í fjør.

### Á fjakkaferð

Aftaná tvey hørð kappingarár við EB/Streymi, har nógv var lagt fyri, trongdi Hanus til at uppliva okkurt annað í lívinum. Liðið kom langt í steypakappingini, og skuldi spæla í Europa, og tí beyðst ikki høvi at fara út at ferðast.

Saman við einum vinmanni fór Hanus á eina longri fjakkaferð. Ferðin byrjaði í november, við kappingarlok, og vardi til februar. Hanus legði leiðina framvið Jamaika, Kuba, Kanada og Meksiko. Hann er sera fegin um at hava upplivað aðrar mentannir, og dregur hann Kuba fram, sum eina serliga, jaliga uppliving.

### Spennandi hópur

Hanus hevur aftur bundið seg til barndómsfelagið, har mamman hevur verið álitisfólk í nøkur ártíggju.

– Vit hava ein spennandi hóp í ár. ÍF kláraði at halda seg í deildini í fjør, og teir spældu ofta góðan fótbólt, men vóru ikki nóg effektivir framman fyri málið, og fingu teir tí ikki sigrarnir, sum høvdu hálað teir longri upp eftir stigatalvuni.

Leiðslan í ÍF meldaði út, at teir ætlaðu at satsa uppá fólkið, sum spældi í 2008, men at teir ætlaðu kortini at styrkja hópin við nøkrum spælarum.

– Og eg havi so valt at verða partur av hesum hópinum, sigur Hanus.

Enn hava teir í ÍF, tó til góðar at síggja, hvussu Rógvi Jacobsen fer at roynast í álopinum. Rógvi hevur verið skaddur, og hevur sín fyrsta dyst til góðar.

– Trupuleikin hjá ÍF er tann sami, sum hjá øðrum smáfeløgum. Byrjannaruppstillingin er kanska sterk, men hópurin hevur ikki verið nóg breiður, og nóg sterkur. Í ár tykist tað, sum vit hava betri ráð til at leikbann og skaðar. Vit hava ein størri hóp, og tað er aðalmunurin, mett saman við onnur kappingár, eg havi spælt við ÍF, staðfestir Hanus.

### Betur enn í fjør

Hini árini hevur málsetningurin hjá ÍF verið at halda sær í deildini.

– Ein skal sjálvandi ikki gera sær ovurstórar vónir. ÍF var jú uppflytari í fjør, og hevði nógvar ungar spælarar, sum ikki høvdu so nógvar royndir í bestu deildini. Men at gera tað betur enn í fjør, tað fara vit sjálvsagt eftir. At rokkið Topp-5 hevði verið ideelt, sigur Hanus varisliga.

Spurdur um tað ikki hevði verið fantastiskt at rokkið einum europeiskum plássi, gerst Hanus enn meiri varin.

– Tað hevði sjálvsagt verið fantastiskt, men vit mugu ikki gera málini so høg, at vit missa mótið. ÍF hevur enn einki kvinnukór, eins og EB/Streymur, men fjepparafelagið »Red Dragons« er komið á vøllin, og Hanus vónar, at teir og hini viðhaldsfólkini hjá ÍF fáa nakað at fegnast um, nú tað í ár eru liðin júst 30 ár, síðani ÍF gjørdist Føroyameistari í bestu deildini.

Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo